**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008?
Send eina grein til dorit@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli

**Næstu ferð:**
Týsdagin hevur Niels Uni Dam grein við heitinum:
Gevið føroyingum altjóða rættartrygd



# Tá børn verða fødd ov tíðliga



TÍÐARGREININ
*Jonna Jepsen, Rithøvundur, stovnari av Dansk Præmatur Forening og mamma at ekstremt tíðliga føddum tvíburum*

**Nógvar familjur við ov tíðliga føddum børnum uppliva, at atferðin hjá teirra børnum er øðrvísi enn hjá øðrum børnum. Hetta er sjálvandi serliga sjónligt í familjum, har onnur systkin eru fødd til vanliga tíð, men atferðin hjá ov tíðliga føddum børnum er mangan somikið øðrvísi, at ikki er neyðugt við nakrari sammeting**

Børn, sum koma í heimin fleiri mánaðir fyri termin, fáa eina harða byrjan. Tey byrja lívið við einari óbúnari sentralnerva-skipan, og undir viðgerðini á neonataldeildin uppliva børnini pínufulla viðgerð, skilna frá foreldrunum og hópin av stress-faktorum. Eitt nú avbrotnan svøvn, akutumhvørvi við alarmum og hektiskum aktiviteti.

Óbúnu sansirnir verða skeivt ella als ikki stimuleraðir, tá barnið liggur í eini kuvøsu uttan fyri lívmóðurina. Taktila sansinum vantar stimbranina frá fosturvatninum, kinæstetiska sansinum tørvar lívmóður-veggin at trýsta ímóti, og vestibulæra sansinum restar vekt-loysið í móðurlívinum og kropsrørslurnar hjá mammuni.

Stimbran og menning av sansunum hevur ávirkan á fleiri aðrar lutir. Eitt nú gevur stimbran av kinæstetiska sansinum eitt økt blóðrensl og er harvið viðvirkandi til menning av heilanum og fyribyrgjan av heilabløðingum. Prematur børn hava heldur ikki ment pínu-linnandi kropsskipanina, og tunna húðin og sarta sansaskip-anin ger, at tey uppliva eina ógvusligari pínu enn fullborin børn gera.

Óbúnu gøgnini kunnu geva heilsutrupulleikar í fleiri ár eftir føðing, og samspælið millum barn og foreldur hevur ofta trong kor orsakað av veiku signalunum frá barninum, og tí tað ikki hevur verið gjørligt hjá foreldrunum at virka sum verjugarður millum barnið og tey negativu stimuli. Harum-framt eru alt ov tíðliga fødd børn, sum hava verið í drúgvari viðgerð, meira ella minni traumatiserað.



**Trupul gerandisdagur**
Ymiskleikin í gerandisdegnum hjá prematur børnum er innan sansir, motorik, sálarlív og kenslur. Tú mást kenna alla søguna hjá barninum, um tú skalt finna kjarnan í teirra trupulleikum og harvið møgu-leikan at hjálpa barninum. Hypersensitiva barnið verður yvirstimulerað bert við eyga-kontakt, bróstgeving, bak-grundstónleiki, sterkum litum, nýggjum upplivingum, massasju, bað og so víðari.

Nógv prematur børn hava trupulleikar við mati orsakað av óbúnu tarmskipan síni. Tey eta kanska lítið og hava ilt, tá tey eta, og tey verða troytt, áðrenn tey eru mett. Tá tey vakna, eru svongdin stór, og tí skríggja tey ofta alt fyri eitt, tá tey vakna. Vakstrartrupulleikar eru vanligir, og óbúnu lunguni, ein viknað immunverja og drúgv viðgerð gevur fleiri prematur børnum trupulleikar við infektiónum og ógvusligum reaktiónum móti hesum.

Ofta sova børnini lætt, tey vakna lætt av brádligum ljóði og tey skulu rurast, ella tey eru bangin fyri sovna. Tey vilja ikki sova einsamøll og sjáldan sova tey leingi ísenn. Nógv prematur børn hava ofta marruna. Partvíst skyldast hesir trupulleikar vantandi svøvnrútmu og partvíst vantandi mettu. Men talan er eisini um seinkaða reaktión upp á ovurstimbran, ótryggleika og harav ein stóran samverutørv.

Traumatisku upplivingarnar í neonatalu tíðini merkja, at fleiri av børnunum hava lágt sjálvsálit og lítið álit á umheiminum. Tey kunnu tí vera ótrygg og bangin. Óttast nýggjar lutir, hendingar, menniskjur og støð, og tí hava tey eisini tørv á eini longri tættari samveru við mammuna. Hetta kann bera við sær, at børnini seinni hava stóran separatiónsótta í longri tíðarskeið.

**Langtíðar fylgjur**
So hvørt sum børnini eldast, ber til at meta um onnur menn-ingarøki. Nógv prematur børn hava trupuleikar við motorisku menningini, hugsavnanini, sansaintegratiónini, samspæli-num við onnur, ótryggleika, seperatiónsótta og lágt sjálv-virði. Og tey kunnu hava innlæringartrupulleikar, máls-ligar trupulleikar, viknaða immunverju, sovi- og etiólag og antin vera ov agressiv ella ov passiv.

Praksis í Danmark er flestu staðni, at prematur børn eftir útskriving verða fylgd av einum barnalækna. Seinfylgjurnar, sum eru nevndar omanfyri, eru fyri tað nógva uttan fyri arbeiðs-økið hjá vanligum læknum, og tí verða hesar ofta ikki upp-dagaðar smábarnaárini. Vanliga koma menningar- og sosialu trupulleikarnir ikki fram fyrr enn í skúlaárunum. Og ung og vaksin, sum eru fødd ov tíðliga, kenna mangan egnar trupul-leikar aftur, tá tey lesa um vanligu seinfylgjurnar hjá prematur børnum.

**Hvat kunnu vit gera**
Gjøgnum mínar fyrilestrar um ósjónligar seinfylgjur og um-vegis felagsarbeiði havi eg havt samband við hundraðtals prema-turforeldur. Tey hava nógvar felags royndir við børnunum. Fyrst og fremst hava tey lært at hugsa í heildini, tá tey meta um síni børn. Basalu tørvirnir skulu nøktast best møguligt. Tað vil siga, at arbeiðast skal hart fyri at vinna á sovi, eti og heilsu-trupulleikunum.

Sosialu tørvirnir krevja minst líka hart arbeiði. Trauma'ini, viðkvomu kenslurnar, lága sjálvsvirðið og vantandi sjálvs-álitið krevja ótrúliga nógvan nærleika, kærleika og umsorg-an. Faktiskt eina totala góð-takan og ongan kritikk. Millum annað hava pinkubarnaterapi, spæliterapi og NLP-terapi positvar effektir við sær, og nógv uppliva, at teirra børn fáa loyst upp fyri sínum traumum og seinni fungera munandi betur á fleiri økjum.

Er talan um drúgvari sam-spælstrupulleikar, hevur Marte Meo-hátturin víst góð úrslit. Álvarsligir tilknýtningstrupul-leikar kunnu kanska hjálpast við holdingterapi. Seinkað málslig menning krevur til tíðir samstarv við talupedagog og málsliga venjing í gerandis-degnum. Sansamotoriskir trupulleikar krevja samstarv við fysio- ella ergoterapeut og at gerandisdagurin verður gagn-nýttur til sansamotoriska stimbran. Harumframt hava børn við sansaintegratiónstrupu leikum tørv á at verða fyri-reikað upp á nýggjar lutir og hendingar.

Fleiri hava góðar royndir við ergo- og fysioterapi til prematur børn. Osteopati og kranio-sakral terapi uppliva fleiri foreldur eisini sum sera skjótar og effektivar viðgerðarhættir, sum skapa samband millum heilahálvurnar, rætta kroystar nakkageislar, fáa kraniuplátur-nar í rætta legu, skapa javnvág í rútmuni á spinalvesku, linna um strongd og skapa javnvág í gøgnunum.

**Niðurstøða**
Ansa vit eftir vanligu fylgjun-um av framskundaðum barns-burði, og seta vit neyðugu tiltøkini í verk nóg tíðliga, kunnu vit rokna við, at tey við skúlabyrjan trívast væl og ikki hava niðursettar funktiónir. Innlit hjá foreldrum, neyðug orka og servitan eru sera týðandi faktorar fyri, um tað eydnast at bøta um fylgjurnar av truplu byrjanini upp á lívið, soleiðis at børnini fáa eina høga lívsgóðsku. Men tað er eisini tørvur á innliti og forstáilsi hjá fakfólki kring barnið og familj-una, soleiðis at heildaviðgerðin og kontinuiteturin í roynd unum eisini eru til staðar í royndini at skapa tað góða lívið.

Tíðargreinin